# GÓÐ TÍÐINDI

„Tí at so sigur Harri herliðanna, ... til tær tjóðir, sum rændu tykkum: „Hvør, ið nertur tykkum, nertur mín eygnastein!““
Zak. 2,12

NR. 4 / JUNI 2024 / ÁRGANGUR 33


## Ísrael – eitt greitt tíðartekin

**„Miðskeiðis í mai mánaði 1948, nakað áðrenn eg fylti 9 ár, var eg á veg niðan loftstrappurnar í barnaheimi okkara í Vági. Komin upp á loftið, møtti eg mammu, sum tók meg í favn og segði: „Nú vænti eg, at Jesus skjótt fer at koma aftur, tí nú hava jødarnir fingið landið aftur.“ Hesi orð brendu seg føst í huga mín og hava mangan mint meg á tað, sum profetarnir profeteraðu um jødatjóðina meir enn 2500 ár frammanundan, og sum er gingið út í dag.“**



Soleiðis byrjar Absalon Absalonsen, sum er ættaður úr Vági, grein sína um Ísrael í profetisku ætlan Guds.

### Ísrael úr øllum londunum

Umleið 600 ár fyri Kristi føðing skrivar Jeremias profetur: *„Tí skulu dagar koma – sigur HARRIN – táið ikki longur skal verða sagt: „So satt sum HARRIN livir, Hann, ið leiddi Ísraelsmenn út av Egyptalandi –“ men: „So satt sum HARRIN livir, Hann, ið flutti avkom Ísraels húss higar og læt tey koma úr Norðurlandi –“ og úr øllum londunum, hagar Eg hevði rikið tey. Og tey skulu búgva í landi sínum.“* (Jer. 23,7-8).

Á døgum Jeremiasar var ferðin úr Egyptalandi tiltikin millum fólk Ísraels sum eitt av stórverkum Guds. Men *dagar skulu koma*, segði Harrin við Jeremiasi, tá ið ísraelsfólk skulu taka til tann Gud, sum savnaði tey saman *„úr øllum londunum“*.

Hetta profetorð er nýliga gingið út! Fólkaflytingin til Ísraels tók dik á seg tíðliga í seinastu øld, og tann 14. mai 1948 varð tjóðin Ísrael endurstovnað. Síðan tá er ein støðug tilflyting farin fram, heilt til dagin í dag – *„úr øllum londunum“*.

### Heim við flogførum

Eins og Jeremias profeteraði um afturkomu jødanna til land teirra mong hundrað ár frammanundan, soleiðis profeteraði eisini Esaias um tað sama umleið 700 ár fyri Kristi føðing. Esaias skrivar: *„Hvørji eru hesi, ið koma flúgvandi sum skýggj, sum dúvur til búr síni? Jú, oyggjarnar bíða eftir Mær, og fremst sigla tarsisskip, ið føra børn tíni higar úr fjarløgu; ...“* (Es. 60,8-9).

Esaias visti um flutning við skipi, men hann hevði hvørki sæð ella hoyrt um, at fólk kundu koma flúgvandi! Men Harrin leiddi hann til at skriva hetta, sum var ókent tá, men sum er vanligt í dag – ferðing við flogfari.

### Profetorð, sum gingu út á Golgata

Á døgum Jesusar gingu mong profetorð út, sum vóru borin fram fleiri hundrað ár frammanundan. Við krossfesting Hansara gekk tað bókstavliga út, sum Dávid kongur profeteraði umleið 1000 ár frammanundan, tá ið Jesus varð leiddur út um Jerúsalem og krossfestur.

Vit lesa í Sálmi 22,19: *„Klæði Míni býta teir ímillum sín, um kyrtilin kasta teir lut.“* Í 17. versi lesa vit: *„... teir hava stungið Meg ígjøgnum hendur og føtur.“*

Og í 2. versi lesa vit júst hesi orð, ið Jesus segði á krossinum: *„Gud Mín, Gud Mín, hví ert Tú farin frá Mær?“*

Esaias profeteraði umleið 700 ár frammanundan um orsøkina til krossfesting Jesusar: *„Men Hann varð særdur fyri brot okkara, soraður fyri misgerðir okkara; straffin varð løgd á Hann, so vit skuldu hava frið, og við sárum Hansara eru vit grødd.“* (Es. 53,5).

### Eitt óhugnaligt ynski

Tann dagin, ið jødafólkið stóð fyri rómverska landshøvdinganum, Pilatusi, og kravdi at fáa Jesus krossfestan og manndráparan Barabbas leyslatnan, settu tey fram eitt óhugnaligt ynski.

Pilatus, sum ikki fann nakra skyld hjá Jesusi, spurdi ráðaleysur: *„Hvat skal eg tá gera við Jesus, sum verður kallaður Kristus?“ Tey svaraðu øll: „Lat Hann krossfesta!““* (Matt. 27,22). Pilatus eftirlíkaði at enda – undir trýsti frá jødunum – kravi teirra og dømdi Jesus til deyða.

Síðan tók Pilatus vatn og vaskaði sær um hendurnar fyri eygum fólksins og segði: *„Eg eri sakleysur í blóðinum av hesum rættvísa – síggið tit til tað!“ Alt fólkið svaraði: „Blóð Hansara komi yvir okkum og børn okkara!““* (Matt. 27,24-25).

### Profetorð um oyðing Jerúsalems

Stutt frammanundan profeteraði Jesus um Jerúsalem og tempulbygningarnar: *„Her skal ikki verða latin steinur eftir á steini, sum ikki skal brótast niður.“* (Matt. 24,2). Hetta gekk bókstavliga út umleið 40 ár seinni – í árinum 70 – tá ið rómverski keisarin, Titus, legði Jerúsalem í oyði.

Í Lukasi 21,24 sigur Jesus um jødafólkið: *„Tey skulu falla fyri svørðsegg og verða herleidd til allar tjóðir, og Jerúsalem skal liggja niðurtraðkað av heidningum, inntil tíð heidninganna er at enda.“*

Jødafólkið ynskti, at blóð Jesusar skuldi koma yvir tey og børn teirra. Hetta ynski teirra varð uppfylt, tá ið Jerúsalem varð lagt í oyði, og jødarnir vórðu riknir í útlegd og spjaddir kring allan heim.

### Aldalangi grátur jødanna

Og síðan tá, ígjøgnum øldirnar, hevur hetta óhugnaliga ynski teirra aftur og aftur verið uppfylt við teimum atsóknum, ið teimum hava verið fyri.

Undir seinna heimsbardaga megnaði Hitler í týningarlegunum at drepa umleið seks milliónir jødar, sum verður mett at vera ein triðingur av øllum jødum í heiminum tá.

Tá ið Jesus gekk út til Golgata berandi krossin, segði Hann við kvinnurnar, sum grótu um Hann: *„Døtur Jerúsalems! Grátið ikki um Meg, nei, grátið um tykkum sjálvar og børn tykkara!“* (Luk. 23,28).

Sanniliga hevur nógvur grátur verið ímillum jødarnar av øllum teimum ræðuligu atsóknum, ið teimum hava verið fyri, heilt til okkara dagar.

## Ímillum fremstu tjóðir heimsins

Men hóast alt hetta gingu orð profetanna út, sum vórðu borin fram nógvar øldir frammanundan. Staturin Ísrael varð, sum sagt, endurstovnaður í 1948, og tað hevur eydnast teimum at byggja landið upp til eina av fremstu tjóðum heimsins.

Áhugavert er at lesa tað, sum Esaias profetur skrivar um endurbyggingina av Ísrael: *„Tey skulu byggja upp aftur hinar avgomlu toftir, reisa aftur tað, sum hevur ligið í oyði frá fornaldartíð; tey skulu reisa av nýggjum oyddar býir, tað, sum hevur ligið í oyði mann eftir mann. Fremmandir skulu standa og rókta fylgi tykkara, útlendingar skulu sleipa á markum tykkara og í víngørðum tykkara.“* (Es. 61,4-5).

Hetta minnir okkum á tær sonevndu kibbutsirnar í farnu øld, har fólk úr mongum londum fóru til Ísraels at arbeiða í smáum samfeløgum. Saman við ísraelsfólki settu tey á stovn nýmótans jarðarbrúk á økjum, ið høvdu ligið sum oyðimørk í nógvar øldir. Tað var væl umtókt, serliga ímillum ung – eisini í Føroyum – at fara til Ísraels eitt skifti at arbeiða í kibbuts.

## Bíblian talar satt

Alt hetta, ið er hent jødiska fólkinum ígjøgnum øldirnar og eisini nú á okkara døgum, átti at fingið okkum at hugsa um, hvat ið nú stendur fyri framman. Vit áttu at gjørt okkum greitt, at tá ið hesir spádómar í Bíbliuni eru gingnir út so bókstavliga fyri eygum okkara, so er tað prógv um, at Bíblian talar satt.

Hetta skuldi fingið okkum at givið øllum tí gætur, sum henda bókin talar um, og sannført okkum um, at allir spádómar Bíbliunnar um komandi dagar eisini fara at ganga út.

## Jesusar profeterar um endatíðina

Eins og profetarnir, so profeteraði Jesus um endatíðina og segði: *„Og tit skulu hoyra um hernaðir og frætta hernaðatíðindi. Síggið til, at tit lata tykkum ikki ræða! Tí so má verða; men endin er ikki enn. Tí tjóð skal reisast móti tjóð, og ríki móti ríki, og hungur og jarðskjálvti skal vera víða hvar. Men alt hetta eru hinir fyrstu verkirnir.“* (Matt. 24,6-8).

Jesus samanber hesar hendingar við fyrstu verkirnar, sum koma á barnakonu, áðrenn sjálv føðingin fer fram.

## Allur heimurin í bardaga

Tveir heimsbardagar hava verið í nýggjari tíð. Í báðum stríddist *tjóð ímóti tjóð og ríki ímóti ríki.* Allur heimurin varð drigin inn í hesar bardagar.

Og síðan útvarp, sjónvarp og onnur nýmótans tøkni er komin fram, hava vit dagliga *frætt hernaðatíðindi og um hungur og jarðskjálvtar víða hvar.*

Og hvussu skjótt tíðindaflutningurin fór at ganga, kundi eingin ímynda sær, tá ið Jesus bar fram áðurnevndu orð. Tí eru hesi orð Hansara í sjálvum sær eisini profetisk, og vit eiga at taka tey til eftirtektar og spyrja: „Hava *fyrstu verkirnir*, sum boða frá endatíðini, longu verið?“

## Brádlig heimsumfatandi hending

Tað næsta, sum fer at henda sambært tí, vit lesa í Bíbliuni, er, at Jesus fer at koma aftur eftir teimum, sum eru komin til trúgv á Hann – og tað hendir brádliga!

Í Lukasi 17,24-27 sigur Jesus: *„Tí eins og snarljósið, táið tað skyggir, lýsir líka úr øðrum enda himmalsins í hin, so skal Menniskjasonurin vera á degi Sínum. … Sum tað gekk á døgum Nóa, so skal eisini verða á døgum Menniskjasonarins: Tey ótu og drukku, tey giftust og vórðu burturgift, líka til tann dag Nóa fór inn í ørkina, og flóðin kom og gjørdi enda á øllum.“*

> **Eins og áðurnevndu profetorð eru gingin út, soleiðis fara tey eisini at ganga út, sum hava við endatíðina og afturkomu Jesusar at gera!**

Og í 30. versi sigur Jesus: *„– so skal eisini vera, tann dag Menniskjasonurin opinberast.“* (Luk. 17,30).

Í 34. versi heldur Jesus fram og sigur: *„Eg sigi tykkum: Ta nátt skulu tvey vera í eini song; annað skal verða tikið við, og annað skal verða latið eftir. Tvær kvinnur skulu mala á somu kvørn; onnur skal verða tikin við, og onnur skal verða latin eftir. Tveir menn skulu vera úti á markini; annar skal verða tikin við, og annar skal verða latin eftir.“* (Luk. 17,34-36).

Lívið gongur sína vanligu gongd, og so kemur Jesus brádliga at heinta Síni. Vit síggja eisini her, at hetta er ein heimsumfatandi hending, tí nátt er summastaðni og dagur aðrastaðni.

## Kríggj í Evropa og í Miðeystri

Fyri stuttum brast aftur kríggj á í Evropa.


**GÓÐ TÍÐINDI** NR. 4

Útgevari: Góð Tíðindi
Konto í Betri: 9181 5604941
Ábyrgd: John í Skemmuni
Umbrot: Anna & annað – Anna Simonsen
Prent: Føroyaprent
Blaðið verður sent øllum húskjum ókeypis og kann lesast á evr.fo

*Hjartans tøkk fyri forbøn og stuðul.*


Tann 24. februar 2022 leyp Russland á Ukraina, og avleiðingarnar fyri fólkið í báðum londunum eru ræðuligar.

Tann 7. oktober í fjør framdi Hamas eina yvirgangsatsókn á Ísrael úr Gaza. 1139 fólk vórðu dripin, og 252 fólk vórðu tikin gíslar. Síðan leyp Ísrael á Hamas, og ræðuliga kríggið í Miðeystri ávirkar allan heimin.

Somuleiðis eru vit vitni til, at antisemitisma (jødahatur) aftur hevur tikið dik á seg, og Ísrael gerst meiri og meiri einsamalt. Hetta samsvarar eisini við tað, sum Bíblian sigur skal henda Ísrael ímóti endanum.

## Eg komi aftur

Ótti sermerkir mong menniskju í heiminum í dag. Jesus segði við lærisveinarnar kvøldið fyri, Hann varð krossfestur: *„Hjarta tykkara óttist ikki! …“* (Jóh. 14,1).

Síðan segði Hann, at Hann fór burtur at gera teimum stað til reiðar og legði so afturat: *„Og táið Eg eri farin burtur og havi gjørt tykkum stað til reiðar, komi Eg aftur og taki tykkum til Mín, so eisini tit skulu vera, har sum Eg eri. Og hagar sum Eg fari, vita tit vegin.“* (Jóh. 14,3-4).

Men ein av lærisveinum Jesusar, Tummas, ivaðist og spurdi: *„Harri, vit vita ikki, hvar Tú fert, og hvussu kunnu vit vita vegin!“ Jesus svaraði honum: „Eg eri vegurin, sannleikin og lívið; eingin kemur til Faðirin uttan við Mær.““* (Jóh. 14,5-6).

## Á ættarlið! Gev orði HARRANS gætur!

Eins og áðurnevndu profetorð eru gingin út, soleiðis fara tey eisini at ganga út, sum hava við endatíðina og afturkomu Jesusar at gera!

Jeremias, sum profeteraði umleið 600 ár fyri Kristi føðing, kallaði á landsmenn sínar, sum vóru trekir at hoyra, og segði: *„Á ættarlið! Gev orði HARRANS gætur!“* (Jer. 2,31).

* * *

Kæru tit, sum lesa hesi orð: *Gevið orði Harrans gætur!* og gerið tykkum til reiðar at møta Jesusi, nú ið afturkoma Hansara, eftir øllum at døma, er í nánd!

# Vitnisburður



**Ynski mítt við hesum vitnisburði er, at tú, sum lesur hann, skalt verða signaður av honum og koma at kenna sama undurfulla Frelsara, sum eg lærdi at kenna í ungdóminum.**

### Tórður Johannesen

Tórður er føddur í 1962 og er uppvaksin í Miðvági, har hann býr saman við konu síni, Selmu. Foreldrini vóru Lea og Andrias Johannesen. Tórður er yngstur av 3 systkjum. Pápin andaðist í 2013 og mamman í 2017.

Miðvágur var eitt gott stað hjá børnum at vaksa upp. Náttúran er rík og fjølbroytt. Og í hesi ríku náttúruni í Miðvági við sandinum og haganum, sum er slættur og góður hjá børnum at ferðast í, og við Leitisvatn, spældi Tórður saman við børnunum í bygdini.

Tórður fiskaði ofta síl á vatninum og seið og reyðfisk á Miðvágsfirði. Ikki so sjáldan kom hann heim við fongi, sum mamman gjørdi teimum til matna. Eisini hevði Tórður krákuungar og skurapisur, sum hann mataði og fiskaði til.

Í haganum vóru vill ross, sum tey ungu róku í rætt og riðu á um sumrarnar. Hetta var ein sannur stuttleiki hjá teimum, og Tórður luttók mangan í hesum og stuttleikaði sær ófört.

7 ára gamal fór Tórður í skúla á Giljanesi. Stutt eftir bleiv barnaskúli aftur í Miðvági, og har gekk hann so, til hann aftur fór í skúlan á Giljanesi í 4. flokk. Skúlaárini dámdi honum væl.

Tórður spældi eisini fótbólt, og nógv tíð varð brúkt á vøllinum. Hann spældi eisini badminton. – Men so fekk hann knallert og gavst við ítrótti, og knallertin fór við allari tíðini.

17 ára gamal fór Tórður til sjós. Fyrst fór hann við ein lítlum útróðrarbáti, og síðan fór hann við trolara og sigldi, til hann fór á skiparaskúla í 1983. Hann tók skiparaprógv í 1984, tá var hann 21 ára gamal.

Sama árið, í august 1984, fór hann sum stýrimaður við trolaranum Neptunus. Síðan hevur hann siglt við fleiri skipum sum stýrimaður og skipari. Nevnast kunnu trolarin Vesturtúgva og Fame, sum sigldi við fóðri. Í løtuni er hann við Víkingi, sum siglir við smolti hjá Bakkafrost.

Í 1988 fóru Tórður og nakrir vinmenn til Ibiza at ferðast. Har hitti hann fittu klaksvíksgentuna Selmu, sum hann fall fyri. Tey giftust í februar 1990 og búsettust í Miðvági í nýggju húsum sínum, sum vóru bygd í 1989. Børnini – 5 í tali – eru øll vaksin.

Tórður hevur frá barni av spælt guitar og sungið, og frá heilt ungum av hevur hann fingist við at yrkja. Seinnu árini hevur hann yrkt, og Selma hevur gjørt løg til yrkingarnar.

Í 2021 góvu tey út fyrsta sangin, ið nevnist „Takkarsongur", og í 2022 sangin „Nøgdsemi". Systkini hjá Selmu, ið nevna seg „Systkini í Garðinum", syngja sangirnar, sum eru á YouTube og Spotify.

Á jólum í 2022 rakti sjúka familjuna. Tórður fekk staðfest krabba í hálsinum og fór til Danmarkar í viðgerð. Undir viðgerðini fekk hann heilabløðing og lammaðist í aðrari síðuni. Hann misti eisini førleikan at tosa, men hetta rættaði seg skjótt aftur. Viðgerðin fyri krabbasjúkuna eydnaðist við Guds hjálp so væl, at hann kundi fara aftur til arbeiðis í oktober 2023.

Í dag er Tórður ein stuðul í samkomuni Kedron í Sørvági. Bæði hann og Selma eru virkin í samkomuni og luttaka ofta við sangi. Tey eru eisini við til bíbliutímar og andaktir ymsastaðni.

### Tórður greiðir soleiðis frá, hvussu hann varð frelstur:

Í 1975 var andalig veking í Føroyum og eisini í Vágunum. Tá var eg 13 ára gamal.

Ein dagin í fríkorterinum í skúlanum á Giljanesi spurdi ein javnaldri meg úti á plenuni: „Tórður, ert tú frelstur?" Eg hevði gingið á møti í missiónshúsinum, alt eg mintist, og svaraði: „Eg veit ikki!"

Síðan vitnaði hesin vinmaðurin fyri mær og segði: „Tú mást taka eina persónliga avgerð fyri Jesusi!" Hann gav mær eina traktat, sum legði dent á, at eg mátti sjálvur taka ímóti Jesusi í trúgv og takka Honum fyri tað, sum Hann hevði gjørt fyri meg.

Har á plenuni trúði eg vitnisburðinum hjá vinmanninum. Eg legði saman hendur, har eg stóð, og takkaði Jesusi fyri, at Hann var deyður fyri meg. Og so hildu vit fram at spæla.

Tá ið skúlin var liðugur, skundaði eg mær heim at siga mammu, at nú var eg frelstur. So spurdi eg hana: „Mamma, ert tú frelst?" Síðan gav eg henni traktatina og fór út aftur at spæla.

Fleiri ár gingu, har eg als ikki hugsaði um, hvørja ávirkan vitnisburður mín hevði havt á mammu.

Men so ein dagin spurdi mamma meg, um eg mintist hin dagin, tá ið eg kom heim úr skúlanum og vitnaði fyri henni. Hon fortaldi nú fyri mær, at hon sá, hvussu glaður eg var, tá ið eg kom inn. Hon sá, at okkurt var hent mær og segði, at hon slapp ikki frá spurninginum, ið hon hevði fingið frá mær: „Mamma, ert tú frelst?" Og hon visti heldur ikki, hvat hon skuldi svara.

Tá ið so pápi og vit systkini fóru á møti seinni um kvøldið, stríddist mamma framvegis við spurningin. Meðan vit eru á møti, fer hon inn á kamarið at hvíla seg og lesur traktatina, ið eg gav henni. Har las hon, at hon mátti persónliga taka ímóti Jesusi fyri at verða frelst.

Hon kom nú í veruliga syndaneyð, græt og rópti á Gud um at frelsa seg. Sum hon las traktatina inni á kamarinum, fall hon á knæ og takkaði Jesusi fyri, at Hann var deyður fyri hana. Tá fall ein djúpur friður í bróst hennara. Nú fekk hon frelsuvissu og kundi hvíla í trúgv á tað, sum Jesus hevði gjørt fyri hana á krossinum.

Mamma segði seinni, at hon var upplærd í øllum hesum úr Bíbliuni, men hon skilti nú, at æviga lívið var ikki nakað, ið tú bara arvaði, men at hon mátti sjálv taka stigið og trúgva á Jesus fyri at verða frelst.

Sostatt fekk eg fleiri ár seinni at vita, at vit bæði – mamma og eg – blivu frelst sama dag.

Hetta, sum hendi, sigur mær, hvussu ómetaliga stóran týdning tað hevur, at vit vitna fyri øðrum.

– Fyrst vitnaði ein vinmaður fyri mær, og tað var orsøkin til, at eg bleiv frelstur. Síðan vitnaði eg fyri mammu, og hon bleiv frelst av vitnisburði mínum seinni sama kvøld.

Eftir at eg var frelstur, fór eg eisini, tá ið høvið beyðst, at luttaka við vitnisburði á møtunum, og tað hevur verið mær til stóra signing.

Tá ið eg møtti Selmu, segði hon mær, at hon var trúgvandi. Og tað hevur havt ótrúliga stóran týdning fyri okkum og familju okkara, at vit bæði hava drigið eina línu á andaliga økinum.

Eg eri ómetaliga takksamur fyri, at eg kom at kenna Jesus sum Frelsara mín, tá ið eg var ungur.



# Hvat er orsøkin til jødahatrið?

John í Skemmuni

Hvussu ber tað til, at so nógv antisemitisma (jødahatur) er í hesum heimi? Hví eru jødar so ábærir fyri hatri, enntá í sokallaðum kristnum londum?

## Stríð um landaøki?

Er tað, at jødarnir hava *„hertikið“* landið Ísrael, veruliga orsøkin til stríðið í Miðeystri og til antisemitismuna kring heimin?

Heilt frá tí at jødarnir vórðu riknir úr landinum ár 70 e.Kr. og líka til okkara dagar, hava teir verið atsøktir, illa viðfarnir og dripnir í mongum av heimsins londum.

Hitler royndi at beina fyri øllum jødum undir seinna heimsbardaga, og vit kunnu spyrja: *„Var orsøkin stríð um landaøki?“* Svarið er: *„Nei, tí tá áttu teir einki heimland!“*

## Vanligt skynsemi

Vita vit veruliga, hvat orsøkin er til alt jødahatrið, sum hevur merkt heimin í øldir, heilt frá tí at jødafólkið varð til?

Nýta vit vanligt skynsemi, so er tað ófatiligt, at slík mótstøða og slíkt hatur skal vera ímóti einum ávísum fólkabólki.

Fylgja vit søgu jødanna, so gerst okkum skjótt greitt, at orsøkin til hetta hatur er ikki, at teir hava endurstovnað landið Ísrael.

## Jødahatrið óskiljandi

Sjúrður Skaale, fólkatingsmaður, helt eina sera beinrakna røðu í Fólkatinginum herfyri í sambandi við antisemitismuna, sum hevur tikið dik á seg eftir yvirgangsatsóknina á Ísrael í fjør.

Eftir røðuna spurdi Alex Vanopslagh Sjúrð: *„Hvad tror ordføreren er årsagen til, at jøder overalt i Europa er forfulgte?“*

Sjúrður svaraði: *„Det er et meget stort spørgsmål. Jeg er lige i gang med et kæmpestort værk, der hedder, „Antisemitisme“, som tager det helt historisk. Det er bare uforståeligt, det had, der har været imod den befolkningsgruppe i …, altså altid. Og derfor er det, man siger, at hvis de ikke har sin egen stat, så er de, som man siger, en skildpadde uden skjold. Det er uforståeligt! Jeg forstår det ikke! Racisme er uforståelig! Jeg kan simpelt hen ikke forstå det!*

## Eitt serstakt fólk

Ja, nýta vit vanligt skynsemi, mugu vit ásanna, at jødahatur er ein gáta. Og henda elligamla antisemitisman átti at fingið okkum at steðga á og hugsa, at okkurt serstakt má vera við hesum fólki.

Er jødin valdur út til eina heilt serstaka uppgávu? Eru tey Guds útvalda fólk? Er tað orsøkin til, at tey eru fyri slíkum hatri?

Og er allur ófriðurin um hetta fólk íbirtur av einum bardaga í andaverðini, sum vit ikki eru varug við?

## Tíðarandin stýrdur av andaverðini

Ein andaherur, sum er í bardaga við alt, ið er av Gudi, stýrir mannahugsanini í hesum heimi.

Paulus skrivar í Efesusbrævinum: *„Tí hjá okkum stendur bardagin ikki við blóð og hold, men við tignirnar og veldini, við harrar heimsins í hesum myrkri, við andaher óndskaparins í himmalrúminum.“* (Ef. 6,12).

Í 2. kapitli minnir Paulus tey trúgvandi í Efesus á tíðina, sum tey: *„… áður livdu í eftir tíðarandanum í hesum heimi, eftir høvdinganum yvir hervaldinum í luftini, andanum, sum nú virkar í børnum ólýdnisins.“* (Ef. 2,1–2).

Sambært hesum er tað tíðarandin, ið stýrir mannahugsanini til at hata tað, ið er av Gudi. Og tíðarandin verður stýrdur av Satan.

## Fíggindskapur

Henda andaliga bardaga síggja vit longu í Fyrstu Mósebók 3, har vit lesa, hvussu ormurin dáraði hugsanirnar hjá Evu og fekk hana at bróta boð Guds.

Menniskjan fall í synd og kom undir dóm Guds, og fíggindskapur og deyði komu inn í mannaættina. Soleiðis sigraði Satan í fyrstu syftu.

Men Gud segði við ormin, at ein Frelsara fór at koma: *„… Hann skal sora høvdið á tær, men tú skalt høgga Hann í hælin.“* (1. Mós. 3,15).

## Frelsuætlan Guds

Síðan útvaldi Gud ein mann, Ábraham, at verða faðir at fólkinum, haðani Frelsarin skuldi koma.

Jødafólkið varð til, og síðan tá hevur Satan verið í bardaga við hetta fólk, tí hann visti, at av hesum fólki fór Hann at koma, sum skuldi *sora høvd hansara.*

Satan hevur tí støðugt av øllum alvi roynt at forða frelsuætlan Guds við at ávirka mannahugsanina til at hata jødarnar.

## Álop ígjøgnum øldirnar

Mong ræðulig álop hava verið gjørd ímóti hesum fólki, heilt frá fyrstum av.

Vit minnast, hvussu Farao royndi at oyða jødarnar í Egyptalandi. Og vit lesa í Gamla Testamenti um øll álopini, ið vórðu gjørd á fólkið, meðan tað búði í Ísrael.

Og tá ið jødarnir vóru í útlegd í Bábel, lesa vit, hvussu Haman fekk kongin Ahasverus at gera eina lóg, sum skuldi oyða allar jødar.

Tá ið Jesus varð føddur, royndi Heródes at drepa Jesus við at drepa øll dreingjabørn í Betlehem, sum vóru 2 ár og yngri.

## Sigur Jesusar á krossinum

Hóast mongu royndir Satans at fella Jesus, so miseydnaðust tær allar.

Tað, sum Jesus varð føddur til, var at gera upp við syndina og at fella Satan.

Í Kolossebrævinum 2 lesa vit um, hvussu tað fór fram: *„Hann avvápnaði tignirnar og valdini og gjørdi tey til skammar fyri eygum alra, táið Hann á krossinum vísti Seg sum sigurharra yvir teimum.“* (Kol. 2,15).

Á krossinum eydnaðist tað Satan so at siga *at høgga Jesus í hælin, men Jesus soraði høvd ormsins* við deyða Sínum.

## Ísrael hevur enn ein leiklut

Bardagin er tó ikki liðugur enn, hóast avgerandi bardagin varð vunnin á krossinum.

Tjóðin Ísrael hevur enn ein týðandi leiklut í tí, sum skal henda til endan.

Tí hevur Satan av øllum alvi roynt at gjørt enda á jødunum og at forða fyri, at teir skuldu fáa landið aftur.

Hitler gjørdi eina roynd, sum endaliga skuldi avgera lagnu jødanna, men hon miseydnaðist.

Satan roynir framvegis at gera alt, hann kann, fyri at steðga frelsuætlan Guds. Men alt jødahatrið og allar royndir at oyða landið Ísrael, sum er kveikt av andaheri óndskaparins í himmalrúminum, fer at miseydnast.

## Í seinasta tíma

Alt tykist at tala fyri, at vit eru í allar seinasta tíma, áðrenn Jesus kemur aftur at fullføra ætlan Sína.

Kreppan í Miðeystri og vaksandi jødahatrið átti at vakt okkum upp at sæð, at her er talan um ein andaligan bardaga, sum skjótt kemur í hæddina.

* * *

Kæri lesari – hvørji síðu eru tú á í hesum bardaganum? Eg hugsi ikki, um tú hevur tikið støðu fyri ella ímóti Ísrael. Men hevur tú tikið støðu fyri Jesusi Kristi, Frelsara heimsins? Tað er avgerandi spurningurin, sum tín æviga lagna er óloysiliga knýtt at.